# Nú koma jødarnir

**Ein brennandi áhugi fyri øllum heimsins londum og fólkasløgum liggur til grund fyri útvarpssamrøðurnar millum Sonna Smith og Hans Holm. Nú kemur Søgan um jødarnar út í bók.**




**Bókabrot:**
**»Fólk flest – eisini her á landi – eisini sokallað upplýst og modernað fólk í dag, ganga runt við einum bílæti av, hvussu ein jødi sær út. Ein jødi er myrkur, hann hevur myrkar eygnabrýr, hann hevur krókuta, yvirhøvur langa nøs. Tað, sum er tað syrgiliga við hesum bílætinum, er jú tað, at hetta er tað bílætið, sum jødahatarar máláðu út fyri fólki fyri góðum hundrað árum síðani og seinni eisini.«**

**Bókabrot:**
**»..staturin Ísrael, har fleiri milliónir jødar búgva, er í roynd og veru tann staturin í verðini, sum hevur tann største prosentpartin av reyðhærdum fólki. So spyrja fólk, hvør er reyðhærdur. Ja, tað eru jú írar, og tað eru skotar, ið eru reyðhærdir. Tað er torført at nerta við hesa hugmynd av, hvussu fólk síggja út so ella so.«**



Rigmor Dam
Mynd: Jens Kristian Vang

Tveir fryntiligir jassar sita í sofuni. Teir minnast aftur á tíðina, tá ið teir gjørdu sendirøðir um heimsins lond og fólk fyri Útvarp Føroya.

Teir báðir vinmennirnir, journalisturin Sonne Smith og leksikalski lektorurin Hans Holm, sum, umframt at báðir tosa tvørámál, hava eitt í felag: Ein brennandi áhuga fyri øllum heimsins fólkum og londum.

Ein áhugi, sum gav tilfar til í minsta lagi 150 útvarpssendingar árini 1985-1997. Sendingar um heimsins fólk og lond, um hvussu fólkini liva, um teirra siðir og søgu, um politikk og landafrøði. Spennandi samrøður millum journalistin og serfrøðingin, sum rúnarbundu fólk til lurtitólið í áravís.

Nú sendirøðin um søgu jødanna varð endusend í útvarpinum í fjør, hevur Sonne Smith, eisini eftir fleiri áheitanir, gjørt av at geva tilfarið út í bók. Orsøkin var hin einfalda, at hann metti søguna um jødarnar vera somikið áhugaverda, at hann í samráð við Hans Holm avráddi at skriva tilfarið niður og geva tað út.

– Og verður útgávan ein succes, so fari eg heilt vist at halda fram við fleiri, sigur Sonne Smith, sum hevur sitið við telduna hetta seinasta árið og skrivað tilfarið frá sendirøðini niður til útgávu.

## Frá Ábraham til Netanyahu

Hóast undirritaða roynir at halda teir til nútíðina her í Havn, eru teir eiðasørir og ferðast alla tíðina aftur í tíð og burtur í fjarðskotin lond.

Ta einu løtuna eru vit stødd í myrkasta Afrika hjá upprunafólkinum har, og víðari til Jerusalem og Spania, og sjálvandi eisini ein túr til indianarar í Norðuramerika, sum sendirøð eisini var um á sinni. Til inkvisitatiónina, nazismuna, bankavirksemi, Berlin, Koranina, Mósebøkurnar, Yemen og sjálvandi koma bæði Ábraham og Netanyahu upp at venda, tá prátið fellir yvir á jødarnar og Ísrael.

– Tað er jú stuttligt, at tá sendirøðin fyrstu ferð varð send í 1996, varð Netanyahu júst valdur til forseta í Ísrael. Og nú hon varð endursend í 2009, varð hann aftur valdur til forseta í landinum. Í aðramáta er støðan fullkomiliga tann sama har niðri í dag, sum tá, hugleiðir Sonne Smith.

Og soleiðis gongur prátið aftur og fram millum teir báðir kammirátarnar.

## Guds útvalda land

At teir á sinni valdu at gera eina røð um jødarnar komst av, at Hans Holm hevði nevnt hetta rættiliga ofta.

– Eg staðfesti, at við teirri miklu og objektivu vitan, Hans Holm hevði um evnið, fór hetta at verða tað higartil einasta føroyska væl skjalfesta, søguliga tilfarið, vit fóru at eiga um ta ótrúligu søguna um jødarnar heilt frá teirri løtu, patriarkurin Ábraham fór úr Ur í Kaldea í núverandi Irak við sínum fólki og fæ, og til okkara dagar, sigur Sonne Smith.

Teir báðir eru samdir um, at føroyingar hava eitt serligt forhold til Ísrael og jødarnar. Sjálvandi fyrst og fremst av átrúnarligum orsøkum. Og Hans Holm hevur altíð lagt seg eftir at vera objektivur í spurninginum um Ísrael.

– Tá sjálvt Svenning av Lofti sigur tað, man nakað vera um tað, sigur Sonne Smith skemtandi.

## Sonn fólkaupplýsing

Sum flestum kunnugt, er Hans Holm er ein ótømandi kelda av vitan og forteljari av Guds náði.

Sum lektorur á Læraraskúlanum hevur hann í mong ár ríkað nemingar á Frælsinum. Men hann hevur tíbetur ikki, sum so nógvir aðrir

**» Tað kom meiri enn so fyri, at onkur fullur maður ringdi til Hans Holm á miðjari nátt, tí selskapið var farið at trætast um eitthvørt!**